## Feelgood Films gevur Burturhug út á sjónbandi

**Á listastevnuni í fjør vakti nýggi filmurin hjá Teiti Árnasyni so stóran ans, at Feelgood Films hevur valt at geva hann út á sjónbandi**

FILMUR
*Ingrid Bjarnastein*

Burturhugur – faroese observations fekk góð ummæli í fjølmiðlunum, og nógv hugdu eftir filminum, tá hann varð sýndur kring landið. Eisini hevur filmurin verið sýndur víða um í Norðanlondum, har hann eisini hevur fingið góð skoðsmál.

Filmurin, sum lýsir viðurskifti í lítlu bygdini Hattarvík, fæst nú á sjónbandi, og veljast kann ímillum eintak við føroyskari talu og eintak, sum umframt føroysku taluna hevur enskar undirtekstir.

Feelgood Films gevur bandið út. Leikstjóri er Teitur Árnason. Filmurin er 56 minuttir til longdar og kostar 198 krónur.

## Tríggir sjónleikir – trý mál

**Mánadagin 1. juli fer ein norðurlendsk ungdómsmentanarlega av bakkastokki á læraraskúlanum í Havn**

MENTAN
*Ingrid Bjarnastein*

Hetta stóra tiltakið er úrslitið av eini ungdómsverkætlan hjá Norðurlandahúsinum, sum er ætlað at framleiða norðurlendskt undirvísingartilfar innan sjónleik og tónleik.

Mánadagin hittast ungdómarnir fyrstu ferð og eina viku aftaná – eftir nógva og harða venjing, endar mentanarlegan við eini framførslu í Norðurlandahúsinum tann 7. juli. Tá fara tey ungu at framføra tríggjar sjónleikir á trimum málum. Talan er um Kullervo úr finska tjóðkvæðnum Kalevala, sum verður framført av Hämeenlinnan Miniteatteri, Þrymskviða úr íslendsku Edduni, verður framførd av Skagleikflokkinum og Margretukvæði verður framført av sjónleikaraskúla Havnar Sjónleikarafelags.

Undir allari venjingartíðini skulu luttakararnir halda dagbólk, og teirra viðmerkingar skulu takast við, tá ið undirvísingarbøkur verða givnar út við sjónleikum og orkesturverkum.

Tiltakið er ein partur av »Strategiske Kultursatsningar« hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum, og hevur tað eisini fingið stuðul frá Mentamálastýrinum. Tórshavnar Býráð, Fjølrit og Føroya Sparikassi stuðla føroysku framleiðsluni.

## Jóansøkubál í Vestmanna

**Vestmanna Ítróttarfelag skipar leygardagin fyri jóansøkubáli á sandinum inni á Fitjum í Vestmanna**

JÓANSØKA
*Ingrid Bjarnastein*

Jóansøkan verður ikki bert hátíðarhildin í Vági í ár. Vestmanna Ítróttarfelag hevur seinastu árini fingið ein fastan tátt, sum er jóansøkubál á sandinum inni á Fitjum í Vestmanna. Og um viðrar verður hetta aftur á skránni í ár.

Skipað verður fyri ponyríðing og høvið verður at grilla pylsur og fáa sær okkurt leskandi. Tey, ið hava hug at fara til jóansøkubál í Vestmanna, skulu taka Grønu Bók við í lumman, tí sungið verður úr henni. Eisini verða lutaseðlar seldir, og siga fyrireikararnir, at vinningarnir eru nógvir og góðir. Klokkan 19.30 heldur Bárður Nielsen, løgtingsmaður, røðu, og um 20 tíðina verður bálið tendrað.

Pony-ríðingin byrjar klokkan 17.30, annars byrja hini tiltøkini klokkan 18.30.

# Barnadeildin fekk sjónvørp

**Seinnapartin mikudagin fór ein stór gávuhandan fram á barnadeildini á Landssjúkrahúsinum. Tá vórðu nevniliga fýra sjónvørp og video, umframt tvær Playstation, handað barnadeildini**


*Mikudagin vóru 4 sjónvørp, video og annað handað barnadeildini. Tað var Kiwanis, sum stóð fyri gávuhandanini*
*Mynd: Finnur Justinussen*

GÁVUHANDAN
*Ingrid Bjarnastein*

Nú skuldi verið lag á manni hjá børnunum, sum liggja á barnadeildini, og á teimum, sum verða innløgd í framtíðini. Mikudagin fekk barnadeildin nevniliga eina stóra gávu frá Kiwanis. Talan er um fýra sjónvørp, fýra video, tvær playstation, fýra hoyritelefonir og boylar til at hanga sjónvørpini upp á.

– Hetta léttir sjálvsagt um tíðina hjá børnunum, sum er innløgd, sigur Tove Thomsen, deildarsjúkrasystir á barnadeildini á Landssjúkrahúsinum.

– Tey hava tó eisini onnur ítriv, sum tey kunnu tríva í, meðan tey eru her, men tað er ikki altíð, at tey orka at fara upp úr songini.

Frammanundan var bara eitt sjónvarp á barnadeildini, sum ber til at rulla ímillum stovurnar, og sigur Tove Thomsen, at bíðirøðin var ofta long til at sleppa framat hesum sjónvarpi.

– Nú er eitt sjónvarp á hvørjari stovu, so nú skuldi verið nógv léttari hjá børnunum at sloppið framat, sigur Tove Thomsen, sum sjálvandi fegnast yvir stóru gávuna Kiwanis hevur latið barnadeildini.

Tíverri eydnaðist tað okkum ikki at fáa hendur á einum umboð fyri Kiwanis áðrenn blaðið fór til prentingar.


*Nú verður léttari at fáa tíðina at ganga við playstation, videomaskinum og sjónvørpum á barnadeildini*
*Mynd: Finnur Justinussen*

# Mentanarhúsið tikið í nýtslu

**Leygardagin tann 29. juni verður Mentanarhúsið í Fuglafirði alment tikið í nýtslu**

MENTANARHÚS
*Ingrid Bjarnastein*

Mentanarhúsið í Fuglafirði hevur longu verið karmur um ymisk tiltøk, men ikki fyrr enn leygardagin, verður húsið alment tikið í nýtslu.

Leygardagin verður millum annað frásøgn um felagið á skránni, umframt brot úr fyrsta leikinum hjá felagnum. Eisini verður vinnarin av búmerkjakappingini, sum felagið skrivaði út fyri eini tíð síðani, avdúkaður, og uppboðssøla verður av málningum til frama fyri sjálvt húsið.

Kaffi, te og okkurt ábit verður til gestirnar og okkurt verður eisini til børnini.


*Mentanarhúsið í Fuglafirði verður alment tikið í nýtslu leygardagin*



Sofus Poulsen, umboðsmaður:

# Sitið alt heimastýrið


*Sofus Poulsen hevur í roynd og veru sitið alt heimastýrið. Hann hevur verið virkin undir tíggju løgmonnum. Á myndini er Sofus avmyndaður við konu sínari, Nessie, við fýra av teimum fimm núlivandi løgmonnunum. F.v. Atli P. Dam (1970-81, 1985-89, 1991-93), Anfinn Kallsberg (1998-), Jógvan Sundstein (1989-91) og Edmund Joensen (1994-98). Hinir løgmenninir eru Pauli Ellefsen, Marita Petersen, Petur Mohr Dam, Hákum Djurhuus, Kristian Djurhuus og Andrass Samuelsen*

**Mikudagin var móttøka í Tinganesi fyri Sofus Poulsen, føroyska umboðsmanninum í Aberdeen seinastu 54 árini**

MÓTTØKA
*Orð:Heri á Rógvi*
*Myndir: Finnur Justinussen*

Føroyska býarmyndin í Aberdeen, Sofus Poulsen, fer 1. juli úr starvinum, hann dúgliga hevur røkt seinastu 54 árini, sum føroyskur umboðsmaður. Ì tí sambandi var móttøka í Tinganesi fyri Sofusi. Heilt fitt av fólki vóru komin saman fyri at heilsa upp á umboðsmannin, sum millum ár og dag hevur savnað sær nógvar vinir og kenningar í Føroyum, og kanska einamest millum fiskimenn.

28. juni 1948 var dagur, tá hann gjørdist Føroyskur umboðsmaður í Aberdeen. Fyrstan tíð var hann settur av vinnuni, men hann varð seinni settur í starv av landsstýrinum Sum vera mann var tað fyri tað nógva fiskivinna, ið merkti arbeiðsdagin hjá umboðsmanninum. Sofus sigur sjálvur, at tað var tann tíð, tá tað vóru fleiri føroysk fiskiskip í Aberdeen enn tað vóru dagar í árinum. Sum umboðsmaður skuldi Sofus duga mangt og hvat, og nógv var, ið fiskiskipunum tørvaðu at fáa hendur á.

Eiler Jacobsen segði í sínari talu til Sofus Poulsen á móttøkuni, at tað ikki var nakað, Sofus ikki kundi fáa hendur á. Hann var víðagitin fyri at vera ein maður við góðum kontaktum, og hann var hollur í ráðum.

Nú 54 ár seinni gevst Sofus Poulsen so at virka, og tað vóru nógv á móttøkuni, sum vóru glað fyri hansara arbeiði. Eingin nýggjur umboðsmaður verður at síggja í Aberdeen, men eitt føroyskt umboð byrjar í næstum í Londum.

– Eg havi verið glaður fyri tíðina. Hetta hevur verið eitt spennandi starv, og eg havi hitt nógv góð og spennandi fólk, sigur Sofus.

Sjálvur er Sofus føddur í 1929. Hann er giftur Nessie. Tey eiga fýra synir, sum búgva ymsastaðni. Sofus og konan eru búsitandi í Aberdeen. Sofus hevur búð á Skálafjørðinum, í Klaksvík og í Havn.

Sosialurin ynskir Sofusi góða eydnu í framtíðini, hvat hon so fer at innibera.


*Olaf Olsen visti eisini frá onkrari søgu um Sofus Poulsen, sum hann her greiðir Eyðuni Elttør, landsstýrismanni, frá*


*Prátið hevur mestur snúð seg um onkran fiskitúrin millum teir báðar, Mortan Johannesen og Sofus Poulsen.*


*Eiler Jacobsen visti nógv at siga um sín góða vin Sofus Poulsen, sum hann hevur fingið nógv gott frá til síni skip millum ár og dag. Her er avmyndaður við konu sínari Beintu*